**DAGSINS MEINING**

## Eingin tillagan av búskapi

Eingin ivi um, at tað er rætt og neyðugt at fremja yvirtøkur og at minka blokkin úr Danmark. Tørvur er at broytingum í ríkisrættarligu viðurskiftunum men alt hetta eigur at verða gjørt við skynsemi. Og ikki hazarderað sum nú. Tað undrar okkum, at uppskotið hjá Javnaðarflokkinum til eina sjálvstýrislóg ongantíð er vorðið tikið í álvara av tinginum, tí tað hevði loyst mong av umrøddu málum.

Nú landsstýrið hevur gjørt eina samtykt um at yvirtaka í fullari ferð og at minka blokkin við somu ferð, mugu vit rokna við, at tað eisini hevur hugsað um avleiðingarnar. Hava vit t.d. ráð til dýran rakstur av dupultfunktiónum, fleiri undirsjóvartunlar osfr! Vit ganga út frá, at Anfinn, Karsten, Heini, Jógvan, Rúna Eyðun og Hergeir longu hava strikað bæði smáu sjúkrahúsini, tí pengar verða neyvan til framhaldandi at gera íløgur í og varðveita trý sjúkrahús. Og vit ganga eisini út frá, at hesi somu fólk, sum so errin vilja yvirtaka og kuta av blokki frá degi til annan, hava strikað slíkt sum undirsjóvartunnil til Norðoyggjar og ein nýggjan Smyril.

Nei, neyvan er hetta komið teimum til hugs. Nú skal yvirskot á fíggjarlógini loysa allar spurningar. Men hvat hava landsstýrisflokkarnir gjørt fyri at tillaga búskapin til nýggju tíðina! Einki. Og hvat ætla teir at gera fyri at tillaga sama búskap! Einki. Hvat siga serkønu og roknskaparkønu ráðgevar hjá landsstýrinum til júst hesar spurningar vit hava nevnt: undirsjóvartunnilin til Norðoyggjar, smáu sjúkrahúsini og Teistan fyri bert at nevna nøkur stórmál, sum m.a. umboð fyri samgonguflokkarnar meta sum teirra hjartamál! Tað verður áhugavert at hoyra, hvørjar íløgur og hvørjar dupultfunktiónir samgongan fer at strika til tess at kunna fullføra sín yvirtøku- og blokkkutanarpolitikk. Formaðurin í Búskaparráðnum hevur sum tann einasti gjørt vart við, at broytingarnar fara at merkjast og krevja nakað av teimum stýrandi. Rætt skal vera rætt – eisini formaður Tjóðveldisfloksins hevur einaferð sagt, at tað verður einki Paradís, tá vit fáa fullveldi.

Tað hevur gingið væl í samfelagnum orsakað av góðum fiskaprísum. Men hvør sigur, at teir blíva við at vera eins góðir. Í veruleikanum hevur landsstýrið ikki lyft fingur fyri at tillaga samfelagið til eina broytta framtíð. Skulu vit standa á egnum beinum, má sterkari lútur til enn bara at dúva uppá eitt óvist yvirskot. Og tá landsstýrið fer so drastiskt til verka við skerjing av blokki, má tað eisini siga, hvussu tað ætlar at tillaga føroyska búskapin til framtíðina. Tað hava vit einki hoyrt um enn.

**Sosialurin**

# Ferðslutrygd í smærru flokkunum




**Ráðið fyri Ferðslutrygd og Føroya Skúlabókagrunnur eru í felag farin undir ferðsluátak í smáu skúlaflokkunum**

FERÐSLUTRYGD
*Tíðindaskriv*

»Ferðsluevni til 1. og 2. flokk« - er heitið á evnismappu, sum Ráðið fyri Ferðslutrygd og Føroya Skúlabókagrunnur geva út í felag. Talan er um mappu við leysum bløðum, sum lærarunum er loyvt eftir egnum tykki at fjølrita til næmingarnar. Á henda hátt kann lærarin sjálvur seta undirvísingina um ferðslu og ferðslutrygd saman eftir hóskandi tørvi.

### Ikki bara duga at javnviga

Í »Ferðsluevni til 1. og 2. flokk« verður m.a. tikið fram, hvussu tað er at vera til gongu í ferðsluni og at finna fram til tryggasta vegin til og úr skúla, sum ikki altíð er hin skjótasti og styttsti. Eisini verða súkkluviðurskiftini viðgjørd: at súkkla snýr seg ikki bara um at duga at javnviga, neyðugt er at hava yvirlit og duga at samskipa sansaárin og rørslur – í veruleikanum eru børn ikki búgvin at súkkla í ferðsluni, fyrr enn tey eru um 10 ára aldur. Umframt nógv onnur vandamál í ferðsluni verður eisini nomið við, hvussu gjørt eigur at verða, tá ið farast skal í buss og úr bussi.

### Tvørfakligt arbeiði

Fólkaskúlalógin býður til heildarundirvísing við tvørfakligum evnum, og til hetta skuldi »Ferðsluevni til 1. og 2. flokk« verið eitt hent amboð, sigur Ráðið fyri Ferðslutrygd. Mappan er bygd upp í pørtum, sum bjóða til at arbeiða við evninum úr ymiskum sjónarhornum. Evnispartarnir eru hesir:




- Prát
- Lesa og skriva
- Telja og rokna
- Tónleikur og rørsla,
- Rørsla
- Spøl
- Evning
- Tilfar til foreldur
- Tilfar til læraran

Stutt vegleiðing er saman við hugskotum um arbeiðshættir. Eisini eru nakrar síður við sangum, og aftast eru tvær glærur í litum við ferðsluskeltum.

Evnismappan er tilsamans 102 síður í A4 stødd og prentað í einum liti. Upprunatilfarið er danskt, men er lagað til føroysk viðurskifti. Føroyskað upprunatekningarnar hevur Janus Dam Guttesen.

# Matiné í Havnar kirkju

TÍÐINDASKRIV
*frá Havnar kirkju*

Eystankórið við Símuni Nónklett á odda fer leygardagin 17 mars at hava sangløtu í Havnar kirkju.

Hetta kór er mannað við sangarum eystarumegin á Skálafjørðinum, har sangtraditiónirnar eru høgt í metum. Kórið hevði konsert seinasta leygardag í Fríðrikskirkjuni, og verður tað sama skrá tó nakað stytt.

Matiné-in verður leygardagin kl. 11.30



Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



# Føroya Arbeiðarafelag: Skulu krevja 20% í lønarhækking

**Føroya Arbeiðarfelag fer nú at orða krøvini, sum skulu leggjast fyri arbeiðsgevararnar, nú samráðingar verða um nýggjan sáttmála. Á aðalfundinum um vikuskiftið, vórðu nøkur krøv umrøtt**

SÁTTMÁLA-SAMRÁÐINGAR

*Áki Bertholdsen*

– Tað er ikki órímiligt at krevja eina lønarhækking upp á 20%.

Tað varð ein niðurstøða á aðalfundinum hjá Føroya Arbeiðarafelag um vikuskiftið.

Á aðalfundinum vórðu sáttmálasamráðingarnar eyðvitað umrøddar. Og eftir fundin er tað greitt, hvørji nøkur av krøvunum verða. Hinvegin varð ongin niðurstøða gjørd um sjálvt høvuðskravið, sum er lønarhækkingin.

Men nevnt varð, at tað hevði ikki verið órímiligt at kravt eina lønarhækking upp á 20%.

Arbeiðarafeløg í Eysturoynni løgdu beinleiðis uppskot fyri aðalfundin um at samtykkja, at lønarkravið skuldi vera 20 %.

Ongin niðurstøða varð gjørd um hetta. Men ført varð fram, at tað hevði ikki verið órímiligt, ikki minst tá ið hugsað var um kanningina, sum grannskoðaravirkið, Rasmussen og Weihe, hevur gjørt um livikorini hjá arbeiðsfólki, og sum vit greiddu frá í Sosialinum týsdagin og í gjár.

Ført varð fram á aðalfundinum at eftir teirri kanningini skal tímalønin hækka minst 15 krónur fyri at nakað sum helst skal vera eftir til klæðir, skógvar, bil, tryggingar, húsarhaldstól, umvæling av húsum, ella stutt sagt, um eitt oyra skal vera eftir nakað annað enn til tað, sum er lívsneyðugt til lívsins uppihald, tvs. rentur, avdrátt, mat olju, streym, telefon, útvarps- og sjónvarpsgjald.

### Onnur krøv

Hinvegin er tað greitt, hvørji onkur av hinum krøvunum verða.

Eitt nú samtykti aðalfundurin at heita á stjórnina í Føroya Arbeiðarafelag at seta tað fram sum eitt krav, at seinasta brotið í grein 17 skal strikast.

Hetta er greinin, har reglarnar um uppsagnartíð av arbeiðsfólki, standa. Har sigur tað síðsta petti, at reglarnar um uppsagnartíð eru ikki galdandi um steðgur kemur í arbeiði vegna rávørutrot ella veður.



*Á aðalfundinum hjá Føroya Arbeiðarafelag um vikuskiftið var semja um, at tað er ikki órimiligt at krevja eina lønarhækking upp á 20%, nú samráðingar aftur verða við arbeiðsgevararnar. Annars er ætlanin at fáa tímalønina fyri náttararbeiði hækkaða, umframt at onnur krøv verða sett*

– Sostatt kann arbeiðsgevari lættliga skáka sær undan reglunum um uppsagnartíð. Er talan um eitt flakavirki, skal arbeiðsgevarin bara lata vera við at keypa fisk í tveir dagar, so sleppur hann undan uppsagnartíðini.

Ingeborg Vinther ásannaði, at hetta var ein sera óheppin orðing og at tey fóru at leggja alla orku í at fáa hetta burtur úr sáttmálanum.

Somuleiðis varð tað samtykt, at eitt krav skal vera, at fáa reglar um aldursviðvbøtur við í sáttmálan.

– Sum sáttmálin er nú, fáa tey, sum akkurát byrja í einum arbeiði, somu løn sum tey, ið hava arbeitt í sama yrki í fleiri ár og tískil hava drúgvar royndir.

– Tað halda vit er heilt órímiligt og hetta er eitt mál, sum vit fara at leggja stóran dent á í sáttmálasamráðingunum, segði Ingeborg Vinther fyri aðalfundinum.

Somuleiðis er tað greitt, at eitt av krøvunum til arbeiðsgevararnar verður at yvirtíðin frá á midnátt til klokkan átta á morgni skal vera 100% allar dagar, eisini leygardagar.

Í løtuni er yvirtíðin fyri náttararbeiði 60%.

Víst verður á, at flest allir aðrir bólkar, eitt nú handverkarar, fáa tvífaldaða tímaløn fyri náttarbeiði ímillum midnátt og klokkan átta á morgni.

Samstundis verður tað eitt av krøvunum, at arbeiðsfólk skulu hava ókeypis arbeiðsklæðir. Ætlanin er eisini at tey, sum hava til arbeiðis at spula fiskakassar, skulu fáa viðbót fyri skitið arbeiði.

Men nú aðalfundurin er liðugur, fer stjórnin í Føroya Arbeiðarafelag at orða tey endaligu krøvini til arbeiðsgevaran.

# Óvist um feløgini fara at samráðast saman

**Tey ymsu arbeiðarafeløgini hava tosað um at samráðast saman, nú nýggjur sáttmáli skal gerast við arbeiðsgevararnar**

SÁTTMÁLA-SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*

Enn er ikki greitt, hvussu arbeiðarafeløgini kring landið fara at samráðast við arbeiðsgevararnar um nýggjan sáttmála.

Sáttmálarnir ganga út 30. apríl og allir sáttmálar eru uppsagdir.

Seinastu tíðina er møguleikin umrøddur, at øll arbeiðarafeløgini, tvs, Føroya Arbeiðarafelag, tey bæði arbeiðarafeløgini í Havn og tey bæði feløgini í Klaksvík skulu samráðast í felag við arbeiðsgevararnar.

Á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag um vikuskifti, upplýsti Ingeborg Vinther, at onkur fundur hevði verið ímillum feløgini um felags samráðingar.

Men enn er heilt óvist, hvussu verður, um øll arbeiðarafeløgini fara at samráðast í felag, um nøkur av teimum fara at samráðast í felag, ella um hvør samráðist fyri seg.

Hon segði, at feløgini fara at tosa meiri um hesi viðurskiftini í næstu framtíð.

Tað skilst, at tað eru nøkur viðurskifti, sum feløgini skulu gera avtalu um, áðenn talan kann verða um at tey fara at samráðast saman.



*Tey fylgja gjølliga við á aðalfundinum hjá Føroya Arbeiðarafelag. Her eru tey úr at gera við at skrivað niður, okkurt ið sagt verður*

Eitt nú skal greiða fáast á, hvussu atkvøðurnar hjá hvørjum felag skulu vektast, tá ið tey skulu atkvøða um tilboð frá arbeiðsgevara, ella um semingsuppskot skulu góðtakast, ella ikki.

Enn er heldur onki greitt um, nær samráðingarnar byrja.

–Ingeborg Vinther gjørdi enn einaferð púra greitt, at Føroya Arbeiðarafelag fer ikki til samráðingarborðið, fyrenn øll hini feløgini eisini eru til reiðar at taka samráðingarnar upp.

